# Vígdis er besti da



## Føroyska Vígdis Hentze Olsen vann í gjárkvøldið kappingina um at gerast besti dansari í Danmark. Við einum triðingi av atkvøðunum var sigurin í sendingini Kan Du Danse? sera sannførandi.

DANSUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*
*Myndir: Jakob Mydtskov*

Tá versta rokið kring hana var av, fingu vit orð vinnaran av Kan Du Danse? Vígdis Hentze Olsen. Vígdis var ikki vís í, um hon var vakin ella droymdi.

- Eg eri alla tíðini bangin fyri, at vekkarin fer at ringja, og eg skal upp at venja ballett, soleiðis lýsti Vígdis tær nærum óveruligu kenslurnar, ið fóru í gjøgnum kroppin á henni hesa løtuna.

### Stórar kenslur

Finalan var eitt kensluborið kvøld.Bæði í upptøkuhølunum og í stovum kring Danmark og Føroyar vóru stórar kenslur uppi í leikinum, tá avgerðin varð tikin, um hvør skuldi vinna heitið besti dansari í Danmark, kr. 250.000 og eitt dansiskeið á einum av fremstu dansiskúlunum í New York. Luttakarar grótu, dómarar grótu og í nógvum stovum grótu sjónvarpshyggjarar. Her vóru rørandi løtur og glaðar løtur. Sjálvt verturin Thomas Mygind viðgekk aftaná, at hann ongantíð áður hevði verið so rørdur, tá hann handaði ein vinning, hetta hóast hann hevur handað fyri yviri 15 milliónir í vinningum í sjónvarpssendingum.

### Størsta hyggjaratalið nakrantíð

Kan Du Danse? er nógv størsta hyggjara successin av eginframleiðslum hjá Kanal 5 nakrantíð. Tí var tað gleðiligt at finalan eisini í góðsku livdi upp til successina. Talan gjørdist um frálíkt sjónvarp. Sjónvarp, ið lýsti stóra list og eisini stórar kenslur. Men tá avtornaði stóð føroyska Vígdis við sigrinum, teimum nógvu pengunum, heitinum besti dansari í Danmark og best av øllum eini ferð til New York, har hon sleppir at liva dreymin, um at sleppa á ein av bestu dansiskúlunum har.

Longu tá Vígdis var 17 plágaði hon foreldrini um at sleppa at fara til New York at dansa. Men tey vildu hetta ikki, og Vígdis fekk møguleika at sleppa til Svøríkið at dansa á balletakademinum í Göteborg ístaðin. Men dreymurin um New York er ongantíð slóknaður.

Vígdis viðgongur eisini, at hetta er nakað av tí mest spennandi við vinninginum.

- Hetta er heilt óveruligt! At sleppa til New York, tað er so fullkomiliga ein dreymur, ið gerst veruleiki, segði hon.

### Vígdis vann á poppinum

Sendingin gjørdist endabresturin á hørðum arbeiði, ið alsamt gjørdist harðari í nærum eitt hálvt ár. Serliga seinastu vikurnar hava verið harðar. Til seinastu sendingina skuldi Vígdis venja ikki færri enn 4 koreografiir: Eina soloframførslu, ið bæði var frálík, sensuel, frek og ágangandi, saman við Damian orkufulla, pompøsa og tempramentsfulla tarvafektaradansin Paso Doble, ið framførsla í var framúrskarandi, saman við Saru eina frálíka Hip Hop koreografi og Pop saman við Patrick. Henda síðsta dansin hevur Vígdis roynt einaferð fyrr í sendingini við heldur ivasamari eydnu. Tí kundi hetta tykjast heldur trupult á pappírinum, men soleiðis sá Vígdis tað als ikki:

- Tað var feitt at sleppa at royna Pop aftur og at sleppa at vísa, at eg dugdi tað, segði hon. Tað fekk hon so sanniliga víst, framførslan var eins og allar framførslurnar í finaluni framúrskarandi. Kenneth Kreutzmann helt um framførsluna av Pop, at nú vóru tey komin til eitt punkt, har tað, sum man sær, er sjálv orsøkin til, at fólk dansar og orsøkin til, at fólk tímir at hyggja at dansi. Charlotte Egstrand

segði seg ikki skilja, hvar dansarnir fingu tað frá. Tí framførslurnar gjørdust bara betur og betur.

Lýsingarorðini hjá dómsnevndini vóru øll jaligt hetta kvøldið, og hetta vísti, at talan var um tey heilt røttu, ið vóru komin í finaluna.

### Á sera høgum støði

Allar parframførslurnar og allar soloframførslurnar vóru framúr góðar, og tað tyktist tí sera opið. Men tá hyggjararnir høvdu atkvøtt, var sigurin hjá Vígdis sera sannførandi. Vígdis fekk 35% av atkvøðunum, Damian á øðrum plássi fekk 25%, meðan Patrick